gult cyan magenta svart



VI‹MERKINGAR

## Eldrapolitikkur



**Vinarliga Páll Petersen**
*valevni Fólkafloksins*

Hava vit gjørt nóg mikið fyri tey gomlu í Tórshavnar kommunu?

Svarið er tíverri nei.

Í Havn eru bert nøkur fá pláss, hvar gomul og óhjálpin kunnu vera fastbúgvandi.

- Ellisheimið við pláss fyri 25 fastbúgvandi fólkum.
- Lágargarður við pláss fyri 46 fólkum, og nøkur til umlætting.
- Umlættingarheimið við pláss fyri 10 fólkum í 3 vikur 2 ferðir um árið
- Eldrasambýlið við pláss fyri 8 fólkum.
- Dagumlættingin við pláss fyri 30 fólkum.

Hetta er alt gott, men í Tórshavnar kommunu har fólkatalið nú verður uml. 17.000 íbúgvar, er hetta ikki nóg mikið.

Vit skulu hava í huga at Kollafjørður, Kaldbak og Argir hava nógvar íbúgvar sum eru eldri og treingja til hjálp. Málið má tí vera, at vit fáa minst eitt eldrasambýlið í áðurnevndu støðum, og fleiri í sjálvum býnum.

Tað er ikki rætt, at tey ið ikki orka meir, skulu flytast burtur úr bygdini, best hevði verið um tey kundu verið í heimbygdini, í einum sambýli, fyri eini 8-10 fólkum, har eisini pláss má verða fyri umlætting í einari akkutari støðu.

Nógv eldri verða ansaði heima av síni familju, hettar er bundið og strævið arbeiði, tað veit eg av royndum. Ynskiligt er, at ein kann lata síni eldri til ansing, eitt vikuskifti, ella eina heila viku, har ein so fær møguleikan at halda frí sum onnur fólk.

Væl veit eg at nøkur fáa heimahjálp nakrar tímar um dagin, men restina av døgninum eru tey prísgivin familjuni ið verður niðurkoyd og at enda ikki orka meira.

Eldrasambýlir er eitt mál ið hevur skund, vel tí eitt av valevnum fólkafloksins, ið vilja gera nakað við hetta sera átrokandi mál.

## Smærri fyritøkur skulu eisini fáa ein møguleika



**Tórfinn Smith,**
*b‡rá›slimur*

Eru fyritøkur, sum hava hug at ogna sær eitt ídnaðarøki, skulu møguleikar vera til tess. Men vit eiga eisini at hugsa um tey, sum vilja byrja í smáum. Tey, sum ikki orka at fara undir størri íløgur í vinnubygningar.

Í Havn er eitt ótal av smærri fyritøkum. Kjallarafyritøkum, sum onkur kallar tær. Hetta eru fólk, sum velja at byrja í smáum. Partvíst tí pengar eru ikki til tær stóru íløgurnar, og somuleiðis fyri at royna seg sjálvan um hugskotið svarar til væntaða úrslitið. At byrja í smáum er ein dygd, og mong eru dømini um fyritøkur, sum einaferð byrjaðu í einum kjallara, og sum nú eru týðandi fyritøkur við nógvum fólki í arbeiði. Bæði í Føroyum og aðrastaðni.

Gongst eini sokallaðari kjallarafyritøku væl, gerst kjallarin ov trongur, og brúk er fyri at taka næsta stigið. Men hóast tað er ikki vist, at grundarlag er fyri at keypa eitt størri ídnaðarøki og byggja virkishøll á. Eitt lagaligari framhald væntar.

Tí kundi verið skilagott, at býráðið meðvirkaði til at geva tílíkum fyritøkum hóskandi karmar. Karmar, sum hesar fyritøkur fáa møguleika til og hava ráð til at virka í. Tílíkar karmar, so viðkomandi fyritøka framhaldandi fyrst og fremst kann hugsa um sína framleiðslu, heldur enn at hava nóg mikið at arbeiða fyri rentur av avdrátt av einum alt ov dýrum virkisbygningi. Var tað ikki júst rentu- og avdráttardeyðin, sum var ein høvuðsorsøk til stóra skrædlið fyri bert nøkrum fáum árum síðani.

Eitt hugskot hevði verið, at býráðið setti karmin upp. Bygdi virkisbygningin. Eina lon, sum kundi hýsa ymiskum smærri fyritøkum til leigu. Soleiðis kundi býráðið víst sín vilja í verki at meðvirka aktivt at menna spírandi vinnulívsframtøk.

Vit hava í býráðnum í dag fleiri nevndir og deildir, men so løgið tað kann ljóða, hava vit onga menningardeild. Sjálvur havi eg fleiri ferðir róð uppundir, at býráðið skipaði eina tílíka deild, men enn hevur tað verið til fánýtis. Men eg fari ikki at gevast so!

## Til veljarar í Rúnavíkar kommunu



**Hans Tausen Olsen**
*Kommunan skal vera fyri alt fólki›*

Gongdin í Runavíkar kommunu hevur verið góð síðani seinasta býráðsval. Høvuðsorsøkin til hettar er framgongdin í føroyska búskapinum yvirhøvur seinastu 4 árini. Økta virksemi og høgu fiskaprísirnir hava gjørt at skattainntøkan hjá kommununi er vaksin munandi.

Kommunan hevur tí verið før fyri at niðurgjarla skuldina skjótari enn upprunaliga ætlað, og sum ætlanin annars var, tá núverandi avtala um kommunuskuldina varð undirskrivað í 1995. Skuldin svara í dag til umleið eina skattaálíkningum, sum má sigast at verða nøktandi.

Annars er at viðmerkja, at Runavíkar kommuna kom hampuliga væl frá kreppuárunum fyrst í 90'unum.

Tað er av stórum týdningi, at núverandi gongd heldur fram, og at fakstrar- og íløguætlanir frameftir verða gjørdar á einum varligum grundarlagi.

Í løtuni arbeiðir kommunar við stórum ætlanum um at útbúgva havnalagið, og talan verður um rættuliga stórar óløgur, um verandi ætlan í síni heils verður sett í verk.

Ætlaða havnaútbyggingin inni á Líknagøtu verður nú útboðin, og verður ætlanin sett í verk kemur hon helst at útfylla verandi íløgukarm í eini 2-3 ár fram-eftir.

Mín áskoðan er, at núsitandi býráð - nú valskeiðið er við at vera runnið - ikki eigur at binda komandi býráð við so stórum óløgum. Heldur eigur komandi býráð at taka endaliga støðu til hesa útbýgging.

Tað er annars ein óskikkur, at fráfarnadi bý- og bygdarráð gjøgnumføra stórar ætlanir beint áðrenn tey fara frá. Fleiri keðilig dømið eru um hetta, serliga frá 80'unum.

Komandi býráð má sum tað fyrsta gera eina raðfesting av íløgum í kommununi í komandi vals keiði.

Mín áskoðan er, at trivnaðurin hjá fólkinum í kommununi nú má raðfestast meira frammalaga. Her hugsi eg um ger av svimjihyli, útbygging av barnaansingini, herundir ansing av skúlabørnum áðrenn og eftir skúlatíð og hækkan av barnafrádráttinum.

Onnur mál, sum eg meti eisini eiga at raðfesta fremri, er bygging av eldrabýli og verandi ætlan við at byggja smærri íbúðir í Runavík til einstaklingar og smærri familjur.

Við hesum skal ikki vera sagt, at eg eri ímóti útbygging av havnalagnum, men mín áskoðan er, at hesar íløgur eisini mugu raðfestast og viðgerðast út frá eini heildarmetan, nú íløgukarmurin hjá kommunum sambært avgerð frá landsmyndugleikunum er rættiliga avmarkaður.

Eg fari at ynskja øllum eitt gott val.

## Klaksvíkingar



**Torleif Sigur›sson**
*B‡rá›slimur*

Jú víst er umráðandi, at Klaksvíkin komandi árini er í tryggum hondum.

Eg havi játtað at vera á javnaðarlistanum í Klaksvíkar kommunu enn eina ferð.

At sita í andstøðu er ikki tað mest spennandi sum er. Seinast komu vit ikki í meirilutan og vit kundu velja at sita og muta ímóti øllum.

Hetta gjørdu vit ikki, men royndu at ávirkað positivt. Okkurt eru vit nøgd við og annað ikki.

Raðfestingina eru vit als ikki nøgd við.

Tí eru vit við aftur.

Tað var hugaligt hjá mær við kappingini á Alnótini við:

Hvør skal verða borgarstjóri í Klaksvík ?

Nú er sera avmarkað, hvat leggjast skal í hetta, tí sjávt í New Zeelandi kundi veljast!

Jú, sjalvandi eri eg væl nøgdur við at liggja so klárt á odda. Tað verður nú ikki avgjørt á Álnótini, - men her norðuri av veljarunum í Klaksvíkar Kommunu, sum hava eitt avgerðandi val týsdagin; at manna býráðið tey næstu 4 árini.

Hvat vit á javnaðarlistanum vilja og ynskja er greitt frá í bløðunum.

Nú er fólk eisini farin at troyttast av øllum hasum vallyftunum.

Tað er gott at hava hjartamál, men máti skal vera við hjarta.

Fólk flest vita, hvat er gjørligt og ikki er.

Eisini er hugaligt at tosað um fortíðina og at hava visiónir um framtíðina, men vit liva í nútíðini og hon skal røkjast og harvið verða eisini lunnar lagdir inn í framtíðina.

Viðhvørt ivast man í, um bæði beinini eru á jørðini hjá verandi og komandi býráðslimum.

Vit vilja gera tað gjørliga og tað vit lova - halda vit.

Tó eitt hjartasuff loyvi eg mær. Tað mest fantastiska er, at ongin gøta ella vegur í Klaksvík er fullgjørdur í ár 2000.

Hetta má broytast og eg trúgvi, at tey mongu eru líka glað við hvør gøta tað er.

Minsta mark má vera, at nú verður byrja við eini gøtu og at hon verður gjørd liðug.

Blíðar heilsur og gott val.

## Menniskja› í mi›depulin

Við einstaka borgaranum í miðdeplinum fer Javnaðarlistin í Vágs bygdaráð at føra ein politikk, sum setur trivnaðin og vælferðina í hásætið.

Okkara fremsta mið og mál er, at í Vágs kommunu skal vera gott at búleikast hjá øllum borgarum.

Vit fara at leggja dent á at tryggja borgarunum jøvn demokratisk rættindi og menna tær kommunalu tænasturnar.

Fyri at náa hesum málum er brúk fyri politikarum, sum bæði duga og tora at taka upp dagsins mál, samstundis sum hugburðurin um tað góða samfelagið ikki verður mistur burtur.

Vit fara at virka fyri at

- gera tað liviligari hjá borgarunum við støðugt at lækka skattaprosentið
- gera tað liviligari hjá familjum við børnum
- hækka barnafrádráttin
- barnagarður verður settur á stovn



Øll størri arbeiði hjá kommuni verða bjóðað út, so mest fæst fyri borgarans skattapening

Havnaútbyggingin skal fremjast so

- vinnuvirki við havnina sleppa at byggja út
- størri skip sleppa til bryggju – landið skal luttaka í hesi útbygging

Eitt blómandi vinnulív og nógv arbeiðspláss, er ein lívstreyt, men kanningar vísa, at skal ein kommuna vaksa og fólk trívast, so er neyðugt, at lokalsamfelagið t.v.s. kommunan hevur nøkur tilboð at bjóða borgaranum. Tí skal dentur verða lagdur á at stuðla allari mennandi mentan í kommuni, bæði ítrótt, tónleik, leiklist, myndlist o.a.

Farið fjølment á væl og veljið ein sterkan Javnaðarlista til býráðsvalið

**Jónleif Augustinussen,** bakari
**Páll Augustinussen**, skrivstovumaður
**Kirstin Strøm Bech,** lærarinna
**Elitha Hjelm,** húsmóðir
**Marius Kjærbæk,** lærari
**Petur Ludvig,** bilførari
**Ey›finn Mørk,** bilførari
**Atli Poulsen,** sjómaður
**Torkil Strøm,** maskinmeistari
**Esther Su›uroy,** lesandi
**Niclas Thomassen,** arbeiðsmaður

X við lista C

gult cyan magenta svart



# Býráðsvalið týsdagin 21. november 2000

**Bil á valstaðið ring 310611**



Elin Lindenskov, býráðslimur



Tórfinn Smith, býráðslimur

**Javnaðarcafé**
**Leygardagin 10.00 - 15.00**
**Sunnudagin 10.00 - 18.00**
**Opið er allan valdagin**



Henning Christensen, pleygari



Magni Dalsgaard, arkitektur



Rigmor Dam, lærari



Hans Jákup Hansen, bygdarráðsformaður í Kollafirði



Sakaris Hansen, avgreiðslumaður



Ingrid Jacobsen, fysioterapeutur



Vígdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag



Hans Madsen, bygdarráðslimur í Kollafirði



Meta Palle, sjúkrahjálpari



Hallstein Sigurðsson, samskipari



Hans Jákup Simonsen, lækni



Hendrik Thomsen, postvaktmeistari

## Hetta vilja vit:

**Umhvørvi**
Móttøkan av burturkasti í kommununi skal skipast soleiðis, at tað er lætt og einfalt hjá hvørjum einstakum at skilja sundur sítt burturkast, soleiðis at umhvørvið ikki verður dálkað. Hvørnir eiga at verða settar upp, so borgarin kann mala sítt lívrunna burturkast. Kommunan eigur at seta sær sum mið, at alt virksemi í kommununi fær ein grønan roknskap.

**Bústaðarpolitikkur**
Tað er skyldan hjá kommununi at bjóða leiguíbúðir til fólk, sum av ymiskum orsøkum ikki sjálv hava møguleika at útvega sær bústað. Hesi eru til dømis lesandi, einsamallir uppihaldarar, støk, rørslutarnað, pensjónistar, sálarliga veik, heimleys og onnur. Miðvísur bústaðarpolitikkur at verða gjørdur í samstarvi við landsmyndugleikarnar.

**Skúlarnir**
Skúlabygningarnir skulu umbyggjast og endurnýggjast. Karmarnir skulu vera so, at brekað børn hava somu møguleikar í skúlanum, sum hini børnini. Nýggir skúlar skulu byggjast. Vit eiga at seta so mikið av peningi av til skúlarnar, at teir kunnu fylgja nýggju skúlalógini. Vit skulu eisini hava høli til at hýsa Frítíðarskúlanum. Høli skulu vera at hýsa frítíðarskúlanum.

**Mentan**
Tórshavnar Kommuna eigur at skapa karmar fyri einum mentanarhúsi, har listafólk av alskyns slag kunnu royna seg og harvið eisini mennast. Tiltøk eiga at verða framd, so øll hava møguleika fyri at menna sínar listarligu gávur.Vit halda, at farast skal undir at skapa Tórsgøtu sum mentanarmiðdepil sum skjótast.

**Ungdómsráð**
Vit eiga at skipa eitt kommunalt ungdómsráð. Hetta skal virka sum lið millum ungdómin og býráðið í málum, sum viðvíkja teimum ungu. Margarinfabrikkin er eitt gott tiltak fyri ungdómin, sum eigur at verða ment.

**Ítróttur**
Karmarnir innan ítróttina eru betraðir seinastu árini, hóast nakað enn er eftir á mál. Eitt nú verður neyðugt at útbyggja svimjihøllina. Tí halda vit, at farið eigur at verða undir at fyrireika ein nýggjan 50 metra langan svimjihyl. Vit mugu eisini finna út av, hvar ein rennibreyt skal gerast.

**Gøtur og vegir**
Gøtu- og vegakervið eigur at verða gjørt soleiðis, at brekað og blind frítt kunnu ferðast í kommununi. Ferðslan kring kommunalu skúlarnar skal skipast, soleiðis at trygt er hjá børnum at ferðast til og frá skúla. Møguleikarnir skulu eisini gerast betur at koma fram við súkklu í høvuðsstaðnum. Bussleiðin skal hava góð kor og vera væl samskipað.

**Brekað**
Býráðið eigur tann 3. desember, sum er dagur teirra brekaðu, á hvørjum ári at halda eitt aðalorðaskifti um viðurskifti teirra brekaðu í kommununi. Allir almennir bygningar í býnum skulu vera atkomiligir hjá øllum.

**Vinnulív**
Vit skulu gera eina menningardeild í býráðnum, sum saman við viðkomandi stovnum tekur sær av at kanna marknaðarmøguleikar og hjálpir til at marknaðarføra vinnulívið í kommununi. Vit skulu hava grundøki tøk til leigu, og eisini eiga vit at byggja raðbygningar við hølum, sum vinnulívsspírar kunnu leiga seg inn í.

**Barnaansing**
Javnaðarflokkurin hevur sum mál at nøkta barnaansingina 100 % í seinasta lagi ár 2003. 100 prosent barnaansing er forteyt fyri, at vit kunnu hava eina livandi kommunu, har familjurnar trívast og vinnulívið blómar.

**Eldrapolitikkur**
Kommunan eigur at yvirtaka eldraøkið. Gjørdist eldraøkið kommunalt mál, høvdu vit fleiri møguleikar at útbyggja økið eftir tørvinum hjá borgarunum í kommununi.

# Javnaðarflokkurin